# Fótinum bilar einki

**Jón Rói Jacobsen hevur ikki vant við fullari ferð, men boðini eru kortini, at hann er 100% leygardagin**

SKAÐI
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Bethune, Frakland:** Eitt av ivamálunum, sum hesa ferð hevur tikið seg upp undan landsdystinum, er, hvørt tað skuldi eydnast at fáa Jón Róa Jacobsen kláran til uppgávuna leygardagin. Ivin stendst av, at Jón Rói fyri 10 døgum síðani keikti sær fótin, tá Frem spældi móti Vejle í donsku steypakappingini.

Týsdagin vandi Jón Rói fyri fyrstu ferð aftur við liðfeløgunum, og hann var eisini partur av liðnum, sum mikudagin fór til Fraklands.



*Henry, Wiltord, Giuly og Cissé eru menninir, sum føroyska verjan skal ansa leygarkvøldið. Og Jón Rói sigur seg vera púrasta kláran at elta hesar í 90 minuttir*

### Verður spardur

Undir venjingunum hevur Jón Rói tó fyri tað nógva verið at sæð fyri seg sjálvan, men tá vit fingu orðið á hann, helt hann ikki, at nakar sum helst ivi var um, at hann er til reiðar, tá dysturin skal spælast.

- Hetta er so fyrsta ferðin, at eg venji rættiliga við bólti í eina viku, og tað hevur gingið væl. At byrja við var kanska eitt sindur tungt at seta fótin til, men tá eg var vorðin heitur, so gekk tað fínt. Tað kann sjálvandi vera, at møðin í fótliðnum fer at merkjast, tá eg eri kaldur aftur, men tað fáa vit so at síggja.

Jón Rói sigur annars, at hesa seinastu vikuna er mesta tíðin farin til at halda fótinum í frið. Men at einstakir túrar tó hava verið á súkklu. Eisini hóast hann ikki heldur, at nakar vandi er fyri eini niðurgongd í konditionellu støðuni.

- Tað er bara ein vika, sum tað snýr seg um, so tað er ikki tað stóra, sum eg missi í so máta.

Og landsliðsvenjararnir tóktust heldur ikki vera bangnir fyri hesum. Tá innanhýsis dystur seinni var á skránni undir venjingini, slapp Jón Rói als ikki upp í part. Sjálvur vildi hann annars gjarna vera við, men Henrik Larsen helt tað vera rættast, um hann bara tók tað róligt fram til dystardagin.

### Bara keylur

Og sjálvur letur verjuspælarin ongan iva vera um, at hann er klárur at renna eftir Henry og hinum álopsstjørnunum í 90 minuttir?

- Tað verður nokk eingin trupulleiki. Og tað er eisini so, at tá tú skalt royna teg móti slíkum spælarum, so verður orkan tað pettið størri av sær sjálvum.

Stóru uppgávurnar hava eisini ofta víst seg sum pallurin, har føroysku avrikini eru lyft upp á hægsta støði, meðan teir á pappírinum lættari dystirnir kanska hava verið teir, har okkara havt havt tað truplast.

Trupult verður tað undir øllum umstøðum leygardagin, og Jón Rói heldur, at talan helst er um størsta uppgávuna, sum føroyingarnir nakrantíð hava staðið fyri. Eisini, um sammett verður við útidystin móti Týsklandi fyri tveimum árum síðani.

- Tað verður kanska nakað øðrvísi, men eg ivist ikki í, at hetta verður minst líka stórt, sum tá vit spældu í Týsklandi.

*Og tað at ein spælari sum Zidane ger sítt veruliga come-back í hesum dystinum. Er tað nakað, sum sigur tykkum nakað?*

- Sjálvandi er tað nakað, sum vit tosa um áðrenn dystin. Tað er jú ein risa uppliving at spæla móti einum av bestu spælarunum, sum nakran tíð hava verið. Men undir dystinum, so er tað kortini øðrvísi. Tá eri teir bara keylur, sum allir aðrir, staðfestir føroyska verjuálitið at enda.

# Imponerandi mótstøða

**Hóast dystartalið hjá metmanninum á landsliðnum, Óla Johannesen, í næstum fer um tey 75, so skerst ikki burtur, at talan framvegis er um imponerandi mótstøðu, sum liðformanninum stendur fyri leygardagin**

LIÐFORMAÐURIN
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Bethune, Frakland:** - Tað er einki at ivast í. Tað verður ein fantastisk uppliving, og hon verður ikki verri, nú onkur ávísur spælari er komin afturat hópinum hjá teimum. Tað er jú nakað av tí størsta, sum tú kanst uppnáa, tá tú skalt spæla móti slíkum stjørnum. Soleiðis ljóða boðini frá Óla Johannesen, tá vit undir seinnu venjingini hósdagin spurdu hann um avbjóðingina, sum nú stendur fyri framman.

*Og tað ljóðar eisini, at talan verður um fult stadion, nú Zidane og aðrir aftur eru við?*



*Óli Johannesen hevur vónir um, at góða avrikið frá heimadystinum móti Fraklandi verður endurtikið. Men sum hann tekur til, so verður tað neyvan so, at føroyska liðið skal trýsta mótstøðuna aftur í egnan brotsteig*

- Tað merkir so bara, at upplivingin og stuttleikin verður enn størri, staðfestir Óli.

### Gekk væl á Tórsvølli

Men hóast glitrandi umstøðurnar kring dystin, so staðfestir Óli, at fyrireikingarnar hjá sær og viðspælarunum ikki verða stórt øðrvísi, enn tær plaga at vera.

- Tær broytast ikki stórvegis. Sjálvandi er tað í tonkunum, at túsundtals fólk hyggja, og at hesin og hasin eru við á mótstøðuliðnum. Men hjá okkum er støðan tann sama. Tað er at halda fast um spælistílin og tær avtalur, sum vit hava gjørt. Óansæð um talan er um Sveis, Írland ella Frakland, so vita vit av, at vit koma undir eitt stórt trýst.

*Men tá tit spældu í Føroyum móti Fraklandi, høvdu tit leingi eitt gott tak á franska liðnum?*

- Sjálvur haldi eg, at vit spældu ein ótrúliga góðan dyst ta ferðina. Vit vóru væl við í fyrra hálvleiki, og tá teir vóru 10 mans, sá tað í løtum út til, at vit kundu trýsta teir.

*Men ambitiónirnar til dystin hesaferð eru kanska ikki til eina endurtøku av tí avrikinum?*

- Tað verður helst trupult, um vit ætla okkum at trýsta teir niðan í egnan brotsteig. Men hinvegin er so heldur ikki ætlanin, at vit skulu standa í verjuni og lossa burtur alla tíðina. Tað vita vit í øllum førum verður ov tungt í 90 minuttir. Okkara setningur er at halda fast í bóltinum, tá vit einaferð fáa fatur í honum, og so mugu vit jú vita, hvat kann spyrjast burturúr.

### Avrikið alt at siga

Skal tosast um skránna, sum landsliðið hevur, so skerst ikki burtur, at dysturin liggur væl fyri. Ikki minst tí føroyska kappingin hevur verið í gongd so leingi.

- Vit burdu í øllum førum verið væl fyri, hóast tað ikki skal skiljast soleiðis, at vit halda okkum vera betri fyri enn hinar. Men tað er í øllum førum nakað nógv betri, enn um dysturin varð spældur í mars mánaði.

Soleiðis tykjast vánirnar hjá Óla at vera góðar undan dystinum, men tá tosað verður um, hvat eitt gott úrslit er hjá liðnum, leggur hann ikki so nógv í at svara.

- Eg tími so ikki at tosa um stig ella mál. Klára vit at gera ein góðan innsats - kanska eins góðan sum seinast móti Fraklandi - so er tað gott. Ta ferðina skuldu vit reisa okkum eftir eitt vánaligt úrslit móti Sveis, so støðan er kanska ikki heilt ólík hesaferð, staðfestir liðformaðurin.

## Virus helt Claus afturi

Beint undan seinnu venjingini hósdagin kom seinasta spælarin afturat føroyska landsliðshópinum. Claus Bech Jørgensen var nevnliga ikki við, tá ferðalagið savnaðist á flogvøllinum í Lille.

Hann hevði havt búkilsku, og tá hetta eftir øllum at døma var orsakað av einum virus, helt landsliðslæknin tað vera skilabetri, um hann ikki kom yvir, fyrr enn smittuvandin við hesum var av.

Tað skuldi hann verið hósdagin, og Claus tók eisini lut í seinnu venjingini hendan dagin, tó at hann ikki tóktist vera heilt so væl fyri, sum hann vanliga er.

Roknað verður tó ikki við, at tað fer at bila stórvegis til dystin. Nakrar góðar máltíðir og nakað av hvíld plaga at hjálpa væl í so máta, soleiðis at kroppurin aftur fær ta orku, sum hann eigur at hava, og lítil ivi man vera um, at enski útisetin verður partur av taktikk-talvuni, tá Henrik Larsen fer at seta liðið leygardagin.

**-mørk**



*Búkilska helt Claus burturi frá fyrstu venjingini, men hósdagin legðist hann afturat føroyska hópinum*
*Mynd: Álvur*